19. august 2009

Tíðindaskriv

Faroe Petroleum fer at bora tveir brunnar afturat í Noregi

Faroe Petroleum boðar frá, at felagið nú er farið undir annað stigið í leitiverkætlanini á tveimum norskum loyvum, og hevur bundið seg til at bora tveir brunnar, nevniliga T-Rex, harav Faroe Petroleum eigur 30%, og Butch, harav felagið eigur 15%.

T-Rex brunnurin er ein metingarbrunnur, sum fer at kanna eitt fund í Norska Havinum. T-Rex miðið er á loyvi PL431, sum varð tillutað felagnum í APA loyvisumfarinum í 2006. Í sambandi við avgerðina at fara undir at bora, hevur Mærsk Oil Norway yvirtikið 70% av loyvinum. Faroe Petroleum eigur hini 30%.

Butch brunnurin verður boraður á einum leitimiði á loyvi PL405 og PL405B. Hetta er eitt spennandi mið á einum øki, sum líkist fleiri fundum í Norðsjónum, og sum liggur 15km eystanfyri Ula og Gyda oljukeldurnar. Felagið hevur áður kunngjørt, at 15% av loyvinum varð selt til Spring Energy, sum afturfyri rindar part av borikostnaðin hjá Faroe Petroleum. Felagið varðveitir 15% av loyvinum. Hinir loyvishavararnir eru Centrica (40%), ið eisini er fyristøðufelag, og Petro-Canada (30%).

Við avgerðini at bora T-Rex og Butch brunnarnar hevur Faroe Petroleum økt boriverkætlanina hjá felagnum, so at hon nú fevnir um 9 brunnar. Av hesum eru fýra brunnar vestan fyri Hetland, ein í Føroyum og fýra í Noregi. 78% av øllum leitikostnaðinum í Noregi verður goldin av landinum umvegis serskattaskipanina í Noregi fyri oljuleitingarfeløg. Felagið hevur fígging til verandi boriverkætlan.

Innan stutta tíð fer felagið undir at bora teir báðar fyrstu brunnarnar í boriverkætlanini. Brunnarnir eru Glenlivet og Tornado, sum liggja vestanfyri Hetland. Nærri verður kunngjørt, táið hesar boringarnar byrja.

Fulfíggjað tíðindaskriv á enskum er á heimasíðu felagsins www.fp.fo